# Fremja grønlendskan útflutning

Hvørjar útflutningsmøguleikar hava grønlendskar fyritøkur, og hvussu skulu grønlendsku fyritøkurnar bera seg at fyri at selja sínar vørur uttanlands? Teinum spurningunum ætla Grønlands Turist- og Erhvervsråd og danska útflutningsráðið sær at svara við einari røð av fyrilestrum, sum verða í Nuuk, Maniitsoq, Sisimiut og Ilulissat teir næstu mánaðirnar, sigur KNR. Aftan á hvønn fyrilestur fáa umboð fyri grønlendskar fyritøkur høvi til at fáa ráð og leiðbeining frá einum umboði hjá danska útflutningsráðnum og einum umboði fyri grønlendska vinnuráðið. Tann fyrsti fyrilesturin í røðini verður í Nuuk tann 23. í hesum mánaðinum.



# Spyrja um veðurlagið

Seinni í hesum mánaðinum fara nakrir danskir granskarar til Eysturgrønlands, har teir fara at spyrja veiðimenn og onnur, hvussu tey hava varnast avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum. Granskaraferðin er komin í lag í einum samstarvi millum donsku veðurstovuna DMI, Nordisk center for regionalforskning og Roskilde Universitets Center. Avtalað er, at grønlendingar verða umboðaðir í granskingini. Tey, sum skipa fyri ferðini og kanningunum, siga, at málið er at fáa staðfest, hvussu veðurlagsbroytingarnar ávirka tey samfelagsligu og tey sosialu viðurskiftini í lokalsamfeløgunum. Granskararnir skulu fyrst vitja Ittoqqortoormiut og síðani Tasiilaq.

# Fólkaheilsurenningin kring landið

**Komandi vikuskiftið verður árliga Fólkaheilsurenningin - fimta árið á rað**

RENNING

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í ár verður lagt til brots í Klaksvík, leygardagin tann 6. september klokkan 14:00. Runnið verður í Havn dagin eftir, sunnudagin 7. september klokkan 13:00. Lýst verður seinni, nær Fólkaheilsurenningin verður í hinum økjunum.

- Eg eri ikki sørt errin av, at vit nú fimta árið á rað kunnu endurtaka frálíka tiltakið við Fólkaheilsurenningini. Eg fegnist um, at "dillan" við at renna, ganga ella bara røra seg, vindur upp á seg um alt landið, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum í tíðindaskrivi.

Endamálið við Fólkaheilsurenningini er ikki at kappast, men at geva øllum – yngri sum eldri – eitt gott og hugnaligt høvi at røra seg. Tað er sjálvsagt púrasta upp til tey luttakandi, um tey renna ella ganga teinin. Tað sum ræður um er at vera við.

- Við at skipa fyri Fólkaheilsurenning, ynskja vit at gera vart við týdningin av at liva sunt. Vit hava øll gott av at røra okkum eitt sindur, og tí vóni eg at síggja nógv fólk til renningina, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður.

Tað skal vera stuttligt hjá øllum at vera við, og tí verður runnið, gingið ella grulvað á tveimum teinum, einum styttri og einum longri. Allir luttakarar fáa frukt og okkurt leskiligt at drekka.



Harumframt fáa tey luttakandi ein endurskinsvest við prenti á til minnis um dagin.

Tilmelding til renningina í Klaksvík fer fram á www.renn.fo. Í Havn er møguleiki fyri at melda seg til á Torginum í SMS frá hósdag til leygardag, umframt á www.renn.fo. Í Havn skal startnummar og endurskinsvestur heintast á Torginum áðrenn leygardagin kl. 16.00 ella ein tíma innan startin. Í Klaksvík skal startnummar og endurskinsvestur heintast ein tíma áðrenn startin.

Í samband við Fólkaheilsurenningina verður skipað fyri ymsum tiltøkum, har tað ber til at fáa upplýsing og ráðgeving um heilsuna.

Tað eru Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sum saman við feløgunum fyri frælsan ítrótt – Bragdið í Havn og Treysti í Klaksvík - ið saman við øðrum stuðlum, ið skipa fyri tiltakinum.

# Dupult útgávukonsert við Stanley Samuelsen og fleiri

**Á útgávukonsertini í Norðurlandahúsinum luttaka Stanley og orkestur og eisini TRIO Acoustica. Konsertin verður sunnudagin, 7. september kl 16 .**

KONSERT



Stanley Samuelsen og Hanus Johansen fingu fyrr í ár listavirðisløn Miðlahúsins Miðlaprísin á 50.000 kr.

Hetta er fyrstu fer Stanley saman við bólki framførir egnan tónleik. Spældir verða sangir úr teimum trimum fløgunum Stanley hevur útgivið, tó verður serligur dentur verður lagdur á seinastu fløguútgávuna "Tíðin rennur".

Aftan á steðgin fer norðurlendski bólkurin "Trio Acoustica" á pallin, sum spælir løg frá teirra nýggjastu fløguútgávu.

Hetta er ikki fyrstu ferð at Trio Acoustica hevur konsert í Norðurlandahúsinum. Í fjør fingu teir frá ummælarum stórt rós fyri teirra einastandi guitarsamanspæl og kórsang. Trio Acoustica spæla egin løg á føroyskum, norskum og donskum. Eisini verða framførdir onkrir klassikarar hjá Beatles, Eagles og Crosby, Stills og Nash.

Sagt at hetta er ein einastandi møguleiki møguleiki at uppliva Stanley saman við fýra fantastiskum tónleikarum frá Danmark og Noregi.

## Skráin:

Stanley við orkestrið (Gert Smedegaard, Stanley og Knut Henriksen)

Trio Acoustica (Steen-Vidar Laren, Øistein Rian og Stanley)


